## Nýggjar bøkur

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur verið sera virkin í desember og hevur givið fleiri bøkur út. Bøkurnar "Góða nátt barnið", "Skipini" og Vetur Meldurbókin" eru til tey smæstu. "Stór skrímsl gráta ikki", "Álvur og hermannapípan" og "Soleiðis varð eg til" eru myndabøkur til bæði smá og stór børn. Tann seinasta er væl egnað til foreldur, sum vilja greiða børnum sínum frá, hvussu vit øll vórðu til, sigur Bókadeildin í tíðindaskrivi.

## Betri samband

Í einum fyrispurningi í Løgtinginum í gjár fýltist tingmaðurin Gerhard Lognberg á, at ferðasambandið millum Sand og Skúvoy er alt ov vánaligt. Millum annað vísti hann á, at strandfaraskipið, sum røkir siglingina, gongur ikki meiri enn fimm míl. Undir orðaskiftinum segði Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, at umhugsað verður at lata ein skjóttgangandi bát flyta ferðafólk til og úr Skúvoy um summarið, eins og gjørt varð í Mykinesi í fjør.

# Alu-Plast fer í gongd nú og handi



**Í Gøtu kommunu bíða tey spent eftir rundkoyringini, sum Landsverk fer at byggja í Gøtudali. Ætlandi verða seks "armar" úr rundkoyringini, harav ein fer vestureftir til møguligan tunnil inn Millum Fjarða, og ein til eitt framtíðar ídnaðarøkið vestan fyri landsvegin, har ídnaðurin í Gøtu kommunu fær velduga stórar møguleikar**

GØTU KOMMUNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hans Mourits Foldbo sigur, at Gøtu kommuna bíðar í spenningi eftir rundkoyringini, sum Landsverk fer at byggja í Gøtudali, har vegurin úr Leirvíkstunlinum kemur oman í landsvegin niðanfyri nýggja ídnaðarøkið.

- Landsverk hevur sett pening av til hetta arbeiði, og vit vænta, at teir fara at gera skjótt av við projektering, soleiðis at arbeiðið kann byrja miðskeiðis í komandi ári.

Borgarstjórin sigur, at úr rundkoyringini verða tilsamans seks armar – ein til Fuglafjarðar, ein til Leirvíkstunnilin og ein oman í Gøtubygd.

Ídnaðarøkið, sum Gøtu kommuna hevur planerað eystan fyri landsvegin norðuri í Gøtudali, er líðugt fyri einum góðum mánaða síðan, og beint eftir ársskiftið er ætlanin, at Alu-Plast fer undir at byggja á økinum.

Planeraða økið er tilsamans einar 13.500 fermetrar, harav teir, sum hava stovnað handilsmiðstøðina, ráða yvir 10.200 fermetrum, meðan Alu-Plast ræður yvir 3.300 fermetrum.

### Lítil seinking

Hans Mourits Foldbo, borgarstjóri í Gøtu kommunu, sigur, at tað tók umleið eina viku longri enn ætlað at gera ídnaðarøkið klárt, men nú er økið gott og væl klárt at fara inn á.

- Vit hava skilt, at Alu-Plast fer í gongd beinanvegin, og um ikki so langa tíð fara teir, sum skulu byggja handilsmiðstøðina, eisini í gongd, sigur hann.

Ætlanin var, at handilsmiðstøðin, sum fer at hýsa fleiri handlum og skrivstovum, skuldi standa líðug til jólar komandi ár, men sum skilst, fer hendan ætlanin ikki at halda. Tí verður handilsmiðstøðin helst ikki líðug fyrr enn móti sumri 2008.

- Vit hava skilt, at tað tekur 12 mánaðir at byggja bygningin hjá handilsmiðstøðini, og síðan tekur tað einar tveir mánaðir hjá handlum og skrivstovum at flyta inn í hølini og rigga seg til. Jólaresið byrjar longu tíðliga í november, og tí náa teir, sum skulu byggja handilsmiðstøðina, ikki at verða klárir til jólasøluna komandi ár. Til tess verður tíðin ov tepur.

### Aðrar umsóknir

Hans Mourits sigur seg hava skilt, at byggingin av sjálvari handilsmiðstøðini fer í gongd um einar 3-4 mánaðir, soleiðis at hon kann lata upp fyri almenninginum fyri summarfrítíðina í 2008.

Borgarstjórin sigur, at tað ikki er óhugsandi, at kommunan í næstum fer undir at planera eitt enn størri øki eystanfyri landsvegin í Gøtudali.

-Vit hava onkrar umsóknir um vinnuligt virksemi, men hesar eru ikki almennar enn, sigur hann.

Spurdur, hvussu stórt samlaða økið eystanfyri landsvegin norðuri í Gøtudali er, sigur Hans Mourits Foldbo, at hetta fer nakað yvir 30.000 fermetrar tilsamans.

- So, her eru nógvir møguleikar og rúmligt hjá vinnulívinum, leggur hann aftrat.

### Rundkoyring nærkast

Hans Mourits Foldbo sigur, at Gøtu kommuna bíðar í spenningi eftir rundkoyringini, sum Landsverk fer at byggja í Gøtudali, har vegurin úr Leirvíkstunlinum kemur oman í landsvegin niðanfyri nýggja ídnaðarøkið.

- Landsverk hevur sett pening av til hetta arbeiði, og vit vænta, at teir fara at gera skjótt av við projektering, soleiðis at arbeiðið kann byrja miðskeiðis í komandi ári.

Borgarstjórin sigur, at úr rundkoyringini verða tilsamans seks armar – ein til Fuglafjarðar, ein til Leirvíkstunnilin og ein oman í Gøtubygd.

- Haraftrat verður vegur bygdur úr rundkoyringini og niðan á nýggja ídnaðarøkið, ein vestureftir til enn eitt nýtt ídnaðarøkið vestanfyri landsvegin, og síðan verður ein sætti armur bygdur vestur eftir til ein møguligan tunnil úr Gøtudali og vestur Millum Fjarða.

### Stórir møguleikar

Borgarstjórin sigur, at Gøtu kommuna hevur sett nakað av peningi av til vegagerð